# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Magni Laksáfoss effektin

Rættuligur røringur er á politiska leikpallinum í løtuni. Ikki meira enn hevur ódnin Dean lagt seg, øtlar hann politiska veðrið í Norðuratlantshavi. Løgmaður roynir sum vera man at slætta sjógvin. Hvussu hetta fer at eydnast vita vit ikki við vissu, tó at seinasta útmeldingin var tann, at nú er aftur semja í samgonguni. Um hetta bara var fyri at sissa Jørgen Niclasen, sum hongur í klønum tráð, um Føroyar verða eitt valdømi, skal vera ósagt.

Orsøkirnar til politiska ódnarveðrið eru tvær: mongu útmeldingarnar hjá Magna Laksáfoss, sum hava sett kílar í landsstýrissamgonguna, samtíðis sum tær hava verið sera væl móttiknar millum manna og ikki minst í Sambandsflokkinum – og so útspælið hjá øðrum sambandsmanni, Edmundi Joensen at gera Føroyar til eitt valdømi. Tvs. at tað eru útspæl og útmeldingar frá tveimum týðandi sambandsmonnum, sum eru orsøkin til tann røring, sum hevur tikið seg upp.

Við øðrum orðum er talan um profilering av einum av samgonguflokkunum, sum í longri tíð ikki hevur verið so heppin og sjónligur á politiska pallinum. Hóast tað er sum tingformaður, at Edmund Joensen leggur uppskot fram, so kemst ikki uttan um, at hann er týðandi partur av flokkinum. Eitt úrslit av hesum kann gerast, sum eisini veljarakanning hjá Dimmalætting vísir, at stóri vinnarin til eitt komandi val verður Sambandsflokkurin. Hann gongur undan at fáa eitt valdømi, sum meirilutin av fólkinum vil, og hann gongur undan at steðga yvirupphitingini, har Sandoyartunnilin er ein partur, sum eisini meirilutin av fólkinum vil. Vit kunnu ikki siga annað enn, at kortini eru væl spæld út og timað, tó at eisini tilvildin er at finna. Eingin loyna er tað heldur, at nógv av tí, sum ML nú førir fram, eisini er í tráð við politisku hugsaninar hjá fyrrverandi sambandshøvdinganum.

Nógv bendir á, at tað verður Sambandsflokkurin, sum eftir valið, fer at leiða samráðingar um at skipa eitt landsstýri. Hann vil helst í samgongu við Javnaðarflokkin og Sjálvstýrisflokkin. Tað eru sterkar kreftir í B og C, sum halda, at Fólkaflokkurin eigur at taka eitt tørn í andstøðu. At B og C megna betri at reka fiskivinnupolitikk og fáa eina eftirlønarskipan upp at standa. Men tað er eisini hugsandi, at Tjóðveldisflokkurin kundi lagst aftrat B og C, um formaðurin vísir størri konsensusvilja. Vit síggja eisini fyri okkum eitt kanónval hjá ML, sum tá kann rudda slóð til formanssessin, og harvið kann snúningspunktið fyri komandi samgongur, um vit vilja tað ella ikki, koma at gerast Magni Laksáfoss. Nakað, sum hóvar EJ og nakað, sum verandi formaður verður noyddur at taka til eftirtektar.

**Sosialurin**

**Viðmerking til grein í Oyggjatíðindi**

## - um Timburhandilin Sand og Páll á Reynatúgvu

Innanhýsis viðurskiftir millum Timburhandilin Sand og Sands kommunu við Páll á Reynatúgvu, blivu almannakunngjørd í Oyggjatíðindi tann 22/8-07.

Tað harmar okkum almikið, at innanhýsis vitan í Sands kommunu, sum Páll á Reynatúgvu hevur ábyrgd av, eru endað í Oyggjatíðindum. Vit meta, at hetta skaðar okkara umdømi og virksemi so mikið, at vit í hesum skrivi mugu kunna um tey fakta, sum ikki stóðu í greinini.

**Leigan**

Á kommunustýrisfundi á sumri 2004 bleiv avtala gjørd millum Sands kommunu og Timburhandilin Sand um leigu av teim hølum, sum fyrrverandi leigari hevur hildið til í mong ár.

Áramálið skuldi verða frá 1/9-2004 og í minst 3 til 5 ár við 6 mánaðar uppsøgn. T.v.s. at vit í fyrsta lagi skuldu verið úti á vári 2008.

Leiguprísurin bleiv avtalaður til at vera tann sami, sum hjá fyrrverandi leigara. Hesar avtalur minnast meirilutin av teim fólkum, ið vóru til staðar á fundinum.

Hóast rykt hevur verið fleiri ferðir at fáa leigusáttmálan um avtaluna, sum bleiv gjørd, er hesin ongantíð latin okkum.

Í staðin hava vit fingið rokning upp á húsaleigu, sum liggur órímiliga langt frá tí, sum bleiv avtalað. Vit hava boðað frá, at vit heldur enn gjarna rinda, tá tann skrivligi leigusáttmálin fyriliggur við tí avtalaða prísi.

**Uppsagdir**

Vit eru munnliga uppsagdir til jan. 2007 og aftur til august 2007. Ein órímilig viðferð, havandi í huga ta avtalu, ið bleiv gjørd, og at órímiliga long tíð er gingin at fáa tilvega grundstykki og viðgjørt umsókn um byggiloyvi.

Vit harmast at vera skuldsettir fyri at tarna menningini í kommununi. Tað er sjálvsagt ikki okkara ynski. Vit ynskja bert eina rættvísa viðferð.

**Goldið grundstykkið**

Í greinini bleiv einki nevnt um, at Sands kommuna skyldar Timburhandlinum Sand nógv fleiri pengar, enn grundstykkið kostar.

**Avleiðing**

Aftan á seinastu munnligu uppsøgnina, eitt hálvt ár áðrenn minsta mark fyri tíðina vit fingu avtalað, og tað, sum vit upplivdu, sum ein sera primitivan atburð av borgarstjóranum Páll á Reynatúgvu í handlinum seinasta fríggjadag, har neyðugt var at vísa honum durafjórðingin, taka vit avleiðingarnar og rýma úr bygdini.

Vit harmast um, at bygdafólkið skal missa enn ein handil.

Vit vóna, at hetta má verða okkara einasta almenna skriv, og at framtíðar samskiftið millum borgarstjóran Páll á Reynatúgvu og Timburhandilin Sand má fara meira professionelt fram.

**Vit flyta til Skopunar**

Tann 4/9-2007 letur Timburhandilin Sand upp í gomlu handilshølunum hjá Herman Winther í Skopun.

Vit hava hópin av góðum upplatingartilboðum og øll eru vælkomin inn á gólvið.

Vit fegnast um tann vælvilja, ið sandoyingar, Skopunar kommuna og Herman Winther hava víst okkum í samband við flytingina.

**William Sand Davidsen**
**Niels Johannes Tjaldrastein**
**Jón Sand Davidsen**
**Timburhandilin Sand**

## Fiskidagaskipan við innbygdum veikleika

BJARTI THOMSEN
Nólsoy

Fyri at fáa sum mest burtur úr fiskatilfeinginum undir Føroyum, er fiskidagaskipan sett í verk. Nógv verður tosað um, at fiskiskip verða effektivari við tíðini og tí skal fiskidagatalið lækka samsvarandi, so at støðið undir fiskidagaskipanini ikki verður máa burtur. Tað tykist sum fleiri halda, at gera vit hetta, so er alt gott. Hetta er ikki so.

Breið semja tykist verða um, at rætt er hvørt ár at fiska umleið ein triðing av tí sum er til av toski, hýsu og upsa. Tá er tilgongd og vøkstur í hvørjum fiskastovni líka nógv sum tað ið tikið veður út og vit veiða lívfrøðiliga burðardygt.

Fyri hýsu og upsa tykist hetta at hava verið støðan, meðan umleið annarhvør toskur er fiskaður hvørt ár og tí er hesin stovnur minkaður samsvarandi og alt ov nógv.

Fiskidagaskipanin skilur ikki ímillum fiskasløg * tá eitt skip brúkar ein fiskidag, fiskar tað tey fiskasløg sum geva mest í pengum til skipið. Er prísurin á toski hægri enn á hýsu og upsa, loysir tað seg at fiska heldur meira tosk og minni av hýsu og upsa. Er munurin í fiskaprísi nóg stórur verður okkurt árið nógv meir enn ein triðingur av toskastovninum fiskaður, og kann henda, um fiskidagarnir fækka munandi, at minni enn triðingurin av hýsu og upsa verður fiskaður. Hetta er ikki skilagott og vil eg halda at hetta er størsti veikleiki við føroysku fiskidagaskipanini.

Roynt hevur verið at friða økir har nógv er til av toski. Hetta er búskaparliga vánalig loysn, tí málið má verða at fáa fiskin so bíliga upp á land sum møguligt. Eisini hevur verið roynt at skerja tey skip mest, sum fiska mest av toski, men hetta forðar ikki øðrum skipum at leggja seg meira eftir toski.

Ein annar møguleiki er at leggja avgjald á tosk sum verður fiskaður Hetta hevði minkað um áhugan at fiskað tosk í mun til at fiska hýsu og upsa. Eisini hevði hetta viðført, at nakað av 'resourse-rentuni' kom til høldar, so sum fleiri halda verða rætt og rímuligt.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.